Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Rørslutarnað og bussteðgistøð

Spurningar:

1. Hvussu gongur arbeiðið at gera bussteðgistøðini í Føroyum klár til nýtslu hjá rørslutarnaðum?
2. Er tað sambært lóg og reglum, at rørslutarnað ikki sleppa at koyra við Bygdaleiðum, um vindmegin er omanfyri 15 m/sek?
3. Er tað í lagi, at vit í Føroyum gera mun á borgarum eftir vindstyrki?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at finna eina loysn, so allir borgarar eru javnsettir at nýta almennu bussleiðirnar?

Viðmerkingar:
Á heimasíðuni hjá Strandferðsluni stendur, at koyristólsbrúkarar ikki kunnu brúka bussleiðinar, tá vindmegin er omanfyri 15 m/sek.

Hetta merkir, at eingin við rørslutarni kann brúka Bygdaleiðir meginpartin av vetrarhálvuni, tí tá er vindmegin omanfyri 15 m/sek dagliga.

Tí er viðkomandi at spyrja, hví mismunur verður gjørdur á fólki í almennu busstænastuni.

Umstøðurnar gera, at m.a. skúlanæmingar við rørslutarni mugu koyrast til og frá skúla við privatum bilum. Vinir, kenningar og familjan mugu traðka til. Í einstøkum føri hevur skúlin syrgt fyri koyring til og frá skúlanum.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur landstýrimanninum.

Á Løgtingi, 25. mars 2022

Jóhannis Joensen